NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Vinnarin funnin

Síðani nýggi VikuskiftisSosialurin kom á gøtuna tann 11. september, hava spurnarlepar til kappingina um dreymaferðina verið at finna í vikuskiftisblaðnum.

Sjey ferðir hava lesararnir havt høvi til at svara upp á ymsar spurningar, og nú er freistin fyri at senda svarleparnar inn so farin.

Høvuðsvinningurin í kappingini var ein ferð við Norrønu, har vinnarin sleppur at búgva í stásiligu suituni á stóra ferðamannaskipinum. Og var tað ikki nóg mikið, so legði Førya Sparikassi samstundis eitt VISA-kort við, har vinnarin kundi nýta upp til 10.000 kr. á ferðini.

Nú er so drigið, og hepni vinnarin, sum nú kann gera seg til at liva sum millióningur í nakrar dagar er **Súsanna Jacobsen av Norðskála.**

Umframt sjálvan høvuðsvinningin var eisini ein eykavinningur drigin. Og heldur ikki hesin var soleiðis at forsmáða. Ein familjuferð til Danland fyri tvey vaksin og tvey børn í bili er altíð nakað, sum er vert at royna eftir, og eisini her skuldi vinnari finnast.

Tann vinningurin endaði úti á Tórgarði í Havn, og var tað Anna Elisa Tórgarð, sum streyk avstað við familjupakkanum.

Annars var áhugin fyri kappingini sera stórur. Tó at alan bert kundi gerast um tveir Rúgvan av brævbjálvum, sum vóru við í lutakastinum, var øgilig, og tó at bara tveir seðlar vórðu drignir upp, so vil Sosialurin saman við Smyril Line og Føroya Sparikassa nýta høvið til at takka øllum teimum mongu, sum eisini tóku lut í spennandi kappingini.

-jm

Prógv

Arin Joensen úr Kaldbak, men sum nú býr á Møn við familju, bleiv í august útlærdur til skipara í 3. grad á »Søfartsstyrelsens skole« á Fanø.

Elisabeth Eið Eliasen, Viborg, hevur lokið prógv sum heilsurøktari við Sosial- og Sundhedsskolen, Skive.

Signar Petersen úr Sandavági hevur tikið djóralæknaprógv (Cand. med. vet.) á Den Kongelige Veterinær- og Landbohøjskole í Keypmannahavn.

Minningarorð um kæra gubba mín
Rósing Anthoniussen

7. mars 1947 12. sept. 2004



Góði Rósing gubbi. Tað kennist hart og óveruligt, at eg her seti meg niður at skriva minningarorð um teg. Tað er ikki at forstanda, at tú ikki ert millum okkum meir. Tú sum altíð var so lívsglaður og smílandi. Havi so nógv rík minnir um teg, bæði frá mínum barndómi og sum vaksin. At koma heim til tykkum, var sum at verða heima hjá okkum. Minnist hvussu mildur tú altíð var við okkum børn, sum spældu har heima hjá tykkum.Vart altíð við tí góða, sama sum tú Anna gumma. Tað føldist at tit vóru góð við okkum børn. Minnist at tú onkuntíð tók harmonikuna fram og spældi fyri okkum og var tað so hugnaligt. Havi eisini rík minnir tá eg var við tykkum og ferðaðist á Strondum og hvussu stuttligt tað var, tá vit vóru onkran stimitúr saman við tær.

Havi so nógv at takka fyri gjøgnum árini, sum tú hevur hjálpt til við. Øll í familjuni kunnu siga, hvussu góðar hendur tú hevði. Um tað var okkurt sum skuldi gerast, ja so vistu vit hvønn vit kundu heita á ella spyrja um ráð. Tú dugdi so væl at síggja eina loysn uppá alt. Tú gjørdi aldrin nakað um teg, arbeiddi stillisliga, uttan nakað hóvasták og legði eitt avbera vælgjørt arbeið úr hondum.

Tú var altíð hjálpsamur, fyrikomandi og ein góður gubbi fyri meg. Tað kennist tómt, at tú ikki longur støkkur inn á gólvið til eitt prát; men eftir hava vit øll tey góðu minnini um teg, sum vit goyma í okkara hjørtum og eru sera takksom fyri. At tú átti Harran í tínum hjarta, spegladist í tínari góðsku og kærleika til tína familju og vinfólk.

Anna gumma, Finn, Regin og tú mín lívsvinkona Mathilda, gubbi var tykkum ein góður maður og pápi. Rósa og Jonn, gumma hugsar um tykkum eisini. Veit hvussu góður abbi var við tykkum og tit við hann. Barngóður og eygagóður var hann. Og tú Pól, tú hevur mist ein góðan verpápa, sum var so nógv fyri tykkum øll. Mamma, Hilmar, Jákup og Jona, saknurin er eisini stórur hjá tykkum, tit hava mist ein góðan beiggja. Tað er gott hjá okkum øllum at vita, at tey sum eru farin undan okkum herfrá, bert eru farin um sýnuna og at vit einaferð aftur skulu síggja tey heima hjá Harranum. Má Harrin styrkja og vælsigna tykkum og okkum øll í tíðini framyvir.

Hvíl í friði

Ása

Tænk når slækt og venner

Snart så er vor vandring slut, ned på jorden her
Og vi skal få flytte hjem, som besluttet er
Om ej dødens bud oss når, Jesus kommer snart
Henter os før jord forgår, tænk så underbart

Tænk når slækt og venner, mødes over der
På den gyldne stranden, skilles aldrig mer
Priser Gud og Lammet, som har kjøbt oss fri
Sorgen flyr, morgen gryr, der i himmelen

Mong en ven er godt forud, til vort kjære hjem
Hviler efter strid er slut, snart vi møder dem
Hver en tåre tørres af, sorg og nød da flyr
Underbare glædesang, evig morgengryr

Hold din klædning ren og hvid, ud i Jesu blod
Og engang vi skal jo ditt, bort om tidens flod
Hør da på basunens lyd, har du alting klar
Lyt nu her du kristi brud, Jesus kommer snart

Fa. Billutir flytur til Havnar

Mánadagin 1. november flytur Fa. Billutir, sum hevur hildið til í Kollafirði síðan 1993, til Havnar. Fyrtøkan letur upp í 200 fermetra stórum handilshølum í Bókbindaragøtu

Mánadagin 1. november letur Fa. Billutir upp í Bókbindaragøtu 18 í Havn. Petur Martin Johansen eigur og rekur fyritøkuna

Mynd: Jens Kristian Vang

Petur Martin Johansen, sum eigur og rekur Fa. Billutir, sigur, at umleið ein triðingur av fólkinum í Føroyum býr í Havn, og hann heldur, at tað eru fleiri fyrimunir við at flyta til Havnar.

Hann hevur leiga handilshølini í Bókbindaragøtu 18, har sum fyrrverandi kolonialhandlarnir, Sigurd Danielsen og Eysturbúðin, hildu til.

Gólvvíddin er umleið 200 fermetrar, og hølini eru sera væl egnaði til endamálið, sigur Petur Martin.

Fa. Billutir bleiv stovnað í Kollafirði í 1993. Fyritøkan selur eykalutir til bilar, so sum plátulutir, útstoyt, lyktir og annars allar slitlutir - bæði brúktar og nýggjar. Eisini hevur fyritøkan gott samband við bilupphøggarar í útlandinum.

Handilin letur upp mánadagin 1. november og telefonnummarið er nú: 321605 og telefax. nr. 321604.

Innsavningin til Ísrael heldur fram

Vinafeløgini Føroyar-Ísrael skipa fyri innsavning, sum er til frama fyri neyðstødd og fátæk í Ísrael

INNSAVNING
tíðindaskriv

Ein partur av innsavningini var, tá Havnarkórið saman við øðrum hevði stuðulskonsert í Læraraskúlahøllini

Innsavningin byrjaði 9. okt., tá stuðulskonsert var í Læraraskúlahøllini, har Havnarkórið og onnur sungu og fitt av fólki var. Eisini er væl av peningini er komin frá fyritøkum og einstaklingum. Feløgini takka hjartaliga fyri stuðulin higartil.

Sum øll vita, so hava áhaldandi yvirgangsatsóknir nú í fýra ár verið til miklan skaða í Ísrael, og mong eru deyð. Hagtølini siga, at eini 600 tilvildarlig fólk eru so álvarsliga skadd at mong av teimum hava fingið mein fyri lívstíð. Eisini eru nógvar barnafamiljur hart raktar.

Innsavnaði peningurin fer óskerdur til:

* barnafamiljur ið hava mist uppihaldara
* fátæk á gøtunum

Hví Ísrael?

Vit vita fullvæl, at neyðin er stór nógvastaðni í heiminum, og ynskja ikki at taka nakað frá nøkrum, men hví vilja vit hjálpa júst Ísrael? Jú, vit halda at vit standa í skuld til teirra. Paulus sigur um tey, ið savnaðu inn til tey fátæku í Judea, at tá ið tey hava fingið part í andaligu góðum teirra, skylda tey teimum eisini at tæna teimum við hinum tímiliga. Jødunum varð orð Guds litið upp í hendur, og teir hava varðveitt tað, og frá jødunum er Kristus komin.

Hervið er ikki sagt, at hjálpin, ið kemur úr Føroyum, skal avmarkast til jødar. Vit vilja ikki gera mannamun. Í Ísrael verður roynt at hjálpa øllum neyðstøddum, uttan mun til fólkaslag.

Feløgini heita aftur inniliga á landsmenn okkara um at taka væl undir við hesi innsavning, sum heldur fram til 15. november.

Tilber at stuðla við at flyta pening á eina av hesum konti: Føroya Banki: 6460 169 252 8 - Føroya Sparikassi: 9181 142 929 0 - Postgiro 204242

Vælkomin í 100 ára føðingardag hjá Heimamissiónini

. - - ćo^ e^ia đ J fppfĖkpeĜpfk r j đ Sćdf

Fr²ggjadagin 5. november:
kl. 20.00 Mßti
Talari: Torleif Johannesen, sj·manstr¼boħari
Magni Christiansen syngur

Leygardagin 6. november:
kl. 16.00 Barnatiltak fyri alla oynna ² V§gs kirkju
Talari: Petur F. Johannesen
Barnak·rini ² Hvalba og Sumba syngja
kl. 20.00 Mßti
Talarar: P·l Johannesen og
Niels J. Nielsen, tr¼boħarar
Porkerisk·riħ og Gratia syngja
kl. 22.00 Ungd·msmßti fyri alla oynna
Andakt: Reimund Langgaard

Sunnudagin 7. november:
kl. 11.00 GudstÞnasta viħ altargongd v/Patrick de
Neerg¬rd og Bergur D. Joensen, s·knarprestum
kl. 13.00 Dßgurħi ² VB-h¼sinum fyri teknaħ*
kl. 18.00 Mßti
Talari: Regin Hßgnesen, tr¼boħari
F·lk ¼r missi·nsh. § Tvßroyri syngja
Bergur D. Joensen, formaħur, endar
** Tekning § tel. 373274 ella 373300*

. - - ćo^ e^ia đ I bd r eĜpfk r j đ Kbpsđh

M§nadagin 8. november verħur 100 §ra fßħingardagshald
² Leguh¼sinum ² Nesv²k viħ hesi skr§:

Kl. 17.00 H¼siħ opiħ
Kl. 17.30 Barnatiltak
Talari: Annelisa Rasmussen
Undirhald: Ćsbjßrn og Absalon.
Pitsasniglar og pylsuhorn eru til
bßrnini og n§tturħi til vaksin.
Kl. 19.00 Heilsanir fr§ Hans J. Joensen, bispi,
J·gvan § Lakjuni, landsstĨrismanni
² mentam§lum, o.ß.
Kl. 21.00 Ungd·mscaf®
J§kup Justinussen o. þ. syngja.
Okkurt til matna

Mßguleiki verħur at lata eina g§vu til Heimamissi·nina

Hjartaliga vÞlkomin!

Kirkjuliga Heimamissiónin

FO - 437 Nesvík
tel. 470000
hm@mission.fo
www.mission.fo